# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
XXXXXX XXXXXXX
XXXXXX@SOSIALURIN.FO
TLF 3418XX

*– Her má ein hugburðsbroyting til hjá leikarunum fyri at venda gongdini, tí hetta var ikki gott nokk.*

*Áki Mørk, Neistin*

Neistin-Stjørnan 21-24 (9-12)

# Stjørnan aftur á odda




*Stjørnan vann toppdystin í Sunset kappingini í hondbólti, tá tær vitjaðu hja Neistanum í Havn. Nú er Stjørnan nýtt oddalið í bestu kvinnudeildini*

**Stjørnan vann toppdystin í Sunset kappingini hjá kvinnum, tá tær vitjaðu hjá Neistanum. Við sigrinum hevur Stjørnan aftur vunnið seg upp á ovastu rók í bestu kvinnudeildini**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Lagt var upp til eitt brak av einum dysti í bestu kvinnudeildini í hondbólti, tá fyrsta umfør av endaspælinum bleiv skotið í gongd um vikuskiftið. Her tók Neistin nevniliga ímóti Stjørnuni, og hesa bæði liðini hava ligið stavn um stavn á fremstu rók í Sunset kappingini í at kalla alt ár.

Undan dystinum lá Neistin fremst við 7 stigum, meðan Stjørnan lá á øðrum plássið við 6 stigum, so vinnarin av dystinum kundi leggja seg einsamallan á odda í bestu kvinnudeildini.

### Dýr løta fyri Neistan

Fyrstu løtuna var eisini líkt til, at dysturin millum Neistan og Stjørnuna fór at gerast sera spennandi. Liðini fylgdust væl at, men sum hálvleikurin leið hevði Neistin hug at fara eitt sindur frá Stjørnuni. Hesa løtuna riggaði væl hjá Neistanum, og tá 10 minuttir vóru eftir førdi bláa havnarliðið við tveimum málum, men so steðgaði eisini fullkomiliga upp hjá teimum.

Síðsta 10 minuttirnar av fyrra hálvleiki sat Stjørnan á øllum. Verjan riggaði væl, og í fleiri umførum gjørdi Neistin feilir, sum Stjørnan dugdi avbera væl at revsa. Henda løtan kom at kosta dýst hjá Neistanum, tí síðstu 10 minuttirnar skoraði Stjørnan heili 7 ferðir, meðan Neistin bert fekk 2 mál.

Tá liðini fóru til hálvleiks førdi Stjørnan 12-9, og okkurt mátti til hjá Neistanum fyri at venda keðiligu gongdini síðstu løtuna.

### Stjørnan mundi blakað alt á gólvið

Stjørnan byrjaði seinna hálvleik, sum tær endaðu í fyrra. Fyrstu 10 minuttirnar fekk Neistin einki mál, meðan Stjørnan skoraði 4 ferðir, og nú førdu gestirnir heili 16-9, og dysturin tóktist avgjørdur. Neistakvinnurnar hingu við høvdinum, og alt sýntist at rigga hjá Stjørnuni.

Men knappliga var alt vent á høvdið. Neistin byrjaði at skjóta mál, verjan og málverjin fingu tak á Stjørnuni, og sum tíðin leið át Neistin meir og meir av leiðsluni hjá Stjørnuni.

Tá 5 minuttir vóru eftir at spæla skoraði Ása á Neystabø til 20-21, og nú var bert eitt mál á muni millum liðini, og alt tóktist kunna henda, tí Neistin hevði víst sera gott spæl og góðan vilja at koma innaftur í dystin síðstu løtuna.

Síðstu 5 minuttirnar setti Stjørnan tó trumf á, og at enda vunnu kvinnurnar úr Klaksvík 24-21. Við sigrinum hava tær nú lagt seg á odda í Sunset kappingini hjá kvinnum, men sjálvt um Neistin tapti í dag, so eru tær beint í hølunum á nýggja oddaliðnum.

## FAKTA

**Neistin-Stjørnan 21-24 (9-12)**
**Málskjúttar:**
**Neistin:** Nicoleta R. Hansen 8 (2), Ása Dam á Neystabø 3, Unn Kragesten 2, Elin Stakksund 2, Gunnvá Brockie 2, Katja Eigemann 2 (1), Louisa Niclasen 1, Rakul Augustinusen 1
Stjørnan: Alina Olaru 6, Simona Petersen 5, Una Olsen 4, Anna K. Samson 4, Durita Christophersen 3, Joan M. Djordjevic 1, Bára S. Klakstein 1
**Brotskøst:** Neistin 7, Stjørnan 0
**Útvísingar:** Neistin 1, Stjørnan 4
**Dómarar:** Karstin Joensen & Kristian Joensen

## – Fáa eina keðiliga periodu

Eftir toppdystin millum Neistan og Stjørnuna fingu vit orðið á Ásu Dam á Neystabø hjá Neistanum. Hon var skuffað av dystinum, og helt, at Neistin tapti dystin síðst í fyrra hálvleiki og fyrst í seinna hálvleiki.

- Munurin á okkum og Stjørnuni er ikki serliga stórur, og oftast eru marginalirnir avgerandi. Í dag fáa vit eina periodu í endanum av fyrra hálvleiki og fyrst í seinna hálvleiki, har einki riggar, og hetta revsa tær okkum fyri. Vit eru tó líka við at fanga tær aftur, men gerast akkurát ov stuttar. Eg veit ikki, hví hetta hendir, men tað kann sjálvandi vera manglandi rutina.

## – Vit høvdu tamarhald á dystinum

Eftir dystin fingu vit eisini orðið á Unu Olsen hjá Stjørnuna. Hon var sum vera man ovurfegin og helt, at Stjørnan var betra liðið henda dagin.

- Vit spældu snøgt sagt betur enn tær í dag. Vit vóru sera uppsettar, og tann gejsturin, sum vit manglaðu seinast, vit møttu teimum, hann var veruliga til staðar í dag. Ta einu løtuna fara vit frá teimum, og her stendur verjan sera væl, samstundis sum vit duga at revsa teirra feilir hesa løtuna. Tær eru tó líka við at fanga okum aftur, men eg føldi allatíðina, at vit høvdu tamarhald á støðuni.